# Bilar

Nr. 103 • hósdagur • 3. juni 2004 • 78. árg.




## Facelift til Mercedes-Benz C



Nýggi Mercedes-Benz C stationcar. Innan er alt gjørt úr betri tilfari, og uttan eru eisini smávegis broytingar við kølaragittari, kúfangarum og lyktum

**At síggja til eru ikki nógvar broytingar hendar við Mercedes-Benz C, men hóast tað er bilurin nógv broyttur. Koyriegin-keikarnir eru meira sportsligir, og tilfarið innan og lakkeringin av bilinum er nýggj**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Eftir fýra ár á marknaðinum hevur Mercedes-Benz C nú fingið eitt facelift.

Innan eru broytingar við instrumentborðinum, og uttan eru eisini smávegis broytingar við kølaragittari, kúfangarum og lyktum.

Sum ein av fyrstu bilum í heiminum hevur Mercedes-Benz C nú fingið nýggja Nano-lakkið, sum við hjálp av "nano-teknologi" (ekstremt smáum partiklum) er meira slitsterkt enn vanligt lakk.

Bilurin fæst við ellivu ymiskum bensin- og dieselmotorum. Í Danmark verður Mercedes-Benz 220 CDI við 150 hk nógv brúktur sum hýruvognur.

Í august kemur ein C240 við 6 syl. motori og 170 hk til Føroya. Bilurin koyrir frá 0-100 km/t uppá 9,2 sek, og toppferðin er 235 km/t. Prísirnir

byrja við kr. 420.000,- fyri ein C180 Kompressor.

## PSA og Toyota 007




"Projekt 007" ella Peugeot 107. Hesin bilurin skal framleðáast í Kekkia sum Peugeot 107, Citroën C1 og sum Toyota

**Projekt 007 - er eitt samstarv millum Toyota og PSA (Peugeot / Citroën) um ein felags bil, sum kemur á marknaðin í 2005. Talan er um ein bil, ið skal framleiðast á eini verksmiðju nærhendis Prag í Kekkia**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Tvær av heimsins størstu bilverksmiðjum, Toyota og PSA, samstarva um ein nýggjan bil, sum kemur á marknaðin í 2005. Verkætlanin kallast "Projekt 007", og er talan um ein lítlan hatchback viá 5 hurðum.

Hjá PSA kemur bilurin at eita Peugeot 107 og Citroën C1. Hvat navnið verður hjá Toyota, vita vit ikki enn. Bilurin skal framleiðast á eini verksmiðju í Kolin nærhendis Prag í Kekkia. Árliga framleiðslan verður 300.000 bilar, har 200.000 verða Peugeot og Citroën og 100.000 Toyota.

Felags plattformurin er frá Toyota. Motorarnir verða: 1.0 litur bensin frá Toyota og 1,4 HDI diesel frá PSA/Ford.

Seinni er ætlanin, at bilurin skal framleiðast í Kina. Møguliga er tað størsta orsøkin til samstarvið millum Toyota og PSA.

*Kelda: FDM / Motor*

## Speed Limiter til 307



Peugeot 307 fæst við nýggja ferðpilotinum, Speed Limiter, sum avmarkar ferðina á bilinum soleiðis, at spitarin ger mótstøðu, tá ferðin kemur upp til tað, sum ferðpiloturin er stillaður til

*Kelda: Peugeot Danmark*

## Næstan 1.000 milliardir



Umsetningurin hjá Toyota seinasta roknskaparár varð næstan 1.000 milliardir krónur og yvirskotið knappar 65 milliardir krónur, sum er tað største nakrantíð

*Kelda: Motor Magasinet*

## Ársins vørubilar 2004



Týska faktíðindablaðið ETM í Stuttgart hevur kosið Mercedes Sprinter og Vito til ársins vørubilar 2004.

*Kelda: Motor Magasinet*




*Seat Toledo Prototipo er ein smartur sportsligur bilur, sum er lakkeraður í tveimum litum. Úr hesum vinklinum er designið bæði nútímans og í gamlan stíl*

Seat Toledo Prototipo

## Spennandi nýggheit frá Seat



*Seat hava fingið sín egna nýggja stíl. Forlyktirnar eru av nýggja dual-xenon systeminum Panorama-glastakið røkkur um so gott sum alla takflatuna*

**Seat Toledo Prototipo er eitt heilt nýtt sedan -konsept. Bilurin er sermerktur av at vera rúmligur og praktiskur við stórum viðførisrúmi. Designið er eisini rættuliga sermerkt og smart**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Ein heilt nýggjur Seat Toledo kemur á marknaðin síðst í hesum árinum. Talan er um triðju generatión av Toledo, sum fyrstu ferð kom á marknaðin í 1991. Núverandi modell er frá 1998.

Nýggi Toledo Prototipo er umleið somu støðd sum núverandi Toledo, men nakað hægri og væl rúmligari. Bilurin er ein tann størsti í sínum klassa. Viðførisrúmið er yvir 500 litrar.

Eitt sum eisini sermerkir bilin er panorama-glastakið, ið røkkur um so gott sum alla takflatuna.

Toledo Prototipo er ein framkomin og væl útgjørdur bilur við stórum 19" hjólum, støddin á lágprofildekkunum er 235/35-19. Forlyktirnar eru av nýggja dual-xenon systeminum.

2,0 litur FSI motorurin er upp á 150 hk við 6-trins girkassa.

Innan er eisini gjørt nógv burtur úr við góðum tilfari og kvaliteti eins og nýggjastu multimedia tøknini. Bilurin verður frumsýndur á Madrid Motor Show.



*Innan er nógv gjørt burtur úr við góðum tilfari og kvaliteti eins og nýggjastu multimedia tøknini*



*Toledo Prototipo hevur sjónvarpsskíggjar í nakkapútunum til videospøl o.a.*